## KT-samskipari á Landssjúkrahúsinum

Vilt tú vera við til at menna eitt tað størsta kt-økið í Føroyum, so hevur tú nú møguleika fyri at søkja starv sum kt-samskipari á Landssjúkrahúsinum - har tað ongatíð er keðiligt at vera…

Landssjúkrahúsið hevur eitt av størstu kt-kervum í landinum við gott 500 brúkarum. Talið økist ár um ár í samband við menningina av talgiltu heilsuskipanina (THS). Áhaldandi menning innan fakskipanir setir sera høg krøv til kt-starvsfólkini, har heilsustarvsfólkini verða sera bundin av atkomuligheitini til hesar fakskipanir, so sum THS, talgild røntgen- og rannsóknarstovuskipan, v.m.

Starvið sum kt-samskipari er eitt sera spennandi starv, har tú kemur at ávirka arbeiðsdagin hjá nógvum heilsustarvsfólkum - eitt starv, sum rætti persónur í stóran mun kemur at mynda sjálv/ur.

**Uppgávur hjá kt-samskiparanum eru m.a.:**
- menna og samskipa kt-trygdina
- menna og viðlíkahalda trygdarpolitikkir
- eftirlit við at kt-trygdin verður hildin
- tryggja at kt-trygdin er í hásæti, tá nýggjar kt-skipanir verða íverksettar
- menna og samskipa kt-support
- samskipa arbeiðið við THS Helpdesk
- fyrifallandi kt-uppgávur

**Førleikakrøv:**
- viðkomandi útbúgving og royndir innan kt
- nærløgd-/nærlagdur
- dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt fjølbroytt og spennandi starv
- eitt starv, sum tú í stóran mun kemur at mynda sjálv/ur
- eitt sera mennandi starv

Fyri at frætta nærri um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við John Eli Joensen, kt-leiðara, jeje@ls.fo ella til Inga Mittún, fyrisitingarleiðara, im@ls.fo. Samskiparin fær tilvísing til kt-leiðaran.

**Umsóknarfreistin er 16. apríl 2010 kl. 12.00**

Gransking & menning

Trivnaður

Sjúklingurin í miðdeplinum

Størv á Landssjúkrahúsinum



www.ls.fo

## Onnur leys størv (sí meira á www.ls.fo)

**Summarfrítíðaravloysarar**
Umsóknarfreistin er 20. mars

**Læknaskrivarar til Eygnadeildina**
Umsóknarfreistin er 22. mars

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Neurologiskt ambulatorium**
Umsóknarfreistin er 22. mars

**Yvirlækni til Oyrna- nasa- og hálsdeildina**
Umsóknarfreistin er 22. mars

**Læknaskrivari til Skurðdep.**
Umsóknarfreistin er 22. mars

**Læknaskrivari til Neurologiskt ambulatorium**
Umsóknarfreistin er 24. mars

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G4/A3**
Umsóknarfreistin er 26. mars

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Eygnadeildina**
Umsóknarfreistin er 26. mars

**Leiðandi ergoterapeutur til Psyk. depilin**
Umsóknarfreistin er 26. mars

**Starvsfólk til Sjúkraflutningstænastuna**
Umsóknarfreistin er 26. mars

**Yvirlækni til Eygnadeildina**
Umsóknarfreistin er 26. mars

**Leiðandi yvirlækni til Med. depilin**
Umsóknarfreistin er 30. mars

## Starvsfólk til Fíggjardeildina

Eitt fast fulltíðarstarv sum roknskaparfólk er leyst at søkja til setan frá 1. mai 2010 ella eftir avtalu.

Landssjúkrahúsið er eitt hitt størsta arbeiðsplássið í landinum og er í støðugari menning, og tað setir høg krøv til deildina.

Starvið sum roknskaparfólk er fjølbroytt, og tú kemur at vera í einum toymi við nógvum dugnaligum starvsfelagum í gerandisdegnum. Tað er umráðandi, at tú kann samstarva við onnur fólk og annars er fyrikomandi.

Vit rokna við, at tú hevur viðkomandi útbúgving ella royndir innan skrivstovuarbeiði, er íðin, hevur áræði og góð samstarvsevni. Royndir innan fíggjarskipan landsins er ein fyrimunur.

**Starvið umfatar:**
- vanligt bókhald
- avstemman
- skanning av skjølum
- móttøku og skráseting av posti
- annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Mittún, fyrisitingarleiðara, tlf. 304586 ella á im@ls.fo. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Umsóknarfreistin er 29. mars 2010 kl. 12.00**



Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til: Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn ella við telduposti til umsokn@ls.fo